

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 10 - 2012

# Oljupallur kann fara í havið

Norski arbeiðsmálaráðharrin, Anniken Huitfeldt, varð í dag kunnað um, at Yme-oljupallurin í Norðsjónum er í so vánaligum standi, at hann kann fara í havið í ódnarveðri í heyst ella í vetur. Norskir fjølmiðlar hava skrivað um støðuna við pallinum í seinastuni, og í dag kunnaði Oljueftirlitið ráðharran um støðuna. Sambært eftirlitinum er ikki vandi fyri mannalívum ella nøkrum stórvegis leka, um pallurin fer. Tað var fyri 14 døgum síðani, at felagið Talisman boðaði Oljueftirlitinum frá, at vandi er fyri, at pallurin kann fara í havið, um neyðugar ábøtur ikki verða gjørdar. Fleiri rivur eru komnar í tann berandi partin, og tað kann hava við sær, at pallurin klárar ikki heystið og veturin. Alt fólkið er tikið av pallinum, og brunnarnir eru tryggjaðir. Á fundinum í dag bleiv ráðharrin eisini kunnaður um, hvat ætlanin er at gera til tess at forða fyri, at Yme-pallurin skal fara í havið. Oljueftirlitið hevur sett eina tilbúgving í verk, men vil ikki siga meiri um málið nú, skrivar NTB.